# BØNARLØTAN

**JUNI, JULI OG AUGUST 2021 36. árg.**

***1. dagur Markus 6.1-29, Orðt. 13.1-25, Ezek. 33.17-33***



*Ungdómslegan í Nantes í oktober 2020*



**FRANKARÍKI, Nantes, OM**
**Cecile og Jóhannis Mortensen**
**Sarah 10, Leah Ève 7, Abigail 2**

Vit røkja ungdómsarbeiðið og aðrar tænastur í samkomuni, men við áhaldandi ótta fyri koronu og terroratsóknum. Tað eydnaðist at hava ungdómslegu beint áðrenn aðru koronuavbyrging. Vit fyrireika Teenstreet Connect og undirvísa ungum, sum ætla at lata seg doypa.

## KRINGVARPIÐ

6. juni útvarpsmøti, Mizpa, Eiði
1. aug. útvarpsmøti, Hebron, Leirvík

## EVANGELISKA RØDDIN á radio.fo (meir á evr.fo)

Sunnukvøld . kl. 20 . . .Kelduvaðið *(endursent hóskv. kl. 21)*
Týskvøld . . . .kl. 21 . . .Á torginum *(endursent sunnud. kl. 12.30)*

## OM
## Teenstreet
Fyrsta TeenStreet tiltakið í ár verður 5. juni í Kelduni í Skálafirði. Biðið, at tað verður til signing fyri nógv ung.

## LOGOS HOPE
Logos Hope manglar barnabíbliur. Í næstum fer Logos Hope aftur til St. Vincent, sum herfyri varð rakt av eldgosi. Logos Hope heitir á føroyingar um stuðul at keypa 3000 barnabíbliur at býta út. Fyri 50 kr. kanst tú geva einum barni eina Bíbliu. Stuðulin kann flytast á kontu 9181-426.219.2 hjá OM Føroyum.

⋆ 1. juli fyllir Miriam Berghamar 18 ár
⋆ 1. august fyllir Andreas Nónstein 12 ár

**2. dagur** *Markus 6.30-56, Markus 13. 1-37, 1.Kor.10,1-11,1*



## DANMARK, Kristnastova
## Sólva og Jákup Hansen
## Susan og Øssur Berghamar
Vit gleðast um víðkaðar møguleikar í verkinum, nú samfelagið aftur hevur latið meir upp. Møtini sunnumorgun kl. 11 halda fram alt summarið – somuleiðis andaktir á grasvøllinum uttan fyri Sjúklingahotellið.



## Dora og Niels Pauli Nónstein
## Sigrid 13, Andreas 12, Kristina 10
Eftir ætlan fer Niels Pauli til Keypmannahavnar at vitja í Kristnastovu, tá skúlarnir byrja aftur eftir summarsteðgin. Vit eru sera takksom og glað um, at vit í mai kundu flyta í egin hús í Havn.



## DANMARK, Hirtshals, Malta
## Anna og Hans Djurhuus

Nú samfelagið letur upp aftur, er ætlanin at hava føroyskt møti í Aalborg 5. juni kl. 19 í Bethaniakirkjuni, Dag Hammarskjøldsgade 2A. Í summar verða møtir á Malta, Vinkelvej 2, sunnudag kl. 11 og 18, og mikudag kl. 20.

## ZAREPTA

Legurnar eru byrjaðar aftur samsvarandi vegleiðing frá myndugleikunum. Biðið, at allar legur og Føroyar sum heild verða vardar móti koronu. Vandi er framvegis fyri, at legur verða avlýstar. Ætlandi byrja summarlegurnar 27. juni. Sí zarepta.fo!



## ONGLAND, Taunton
## Dorit og Simon Marshall

Vit eru takksom fyri aftur at hava møtir og samfelag í samkomuni. Simon undirvísir á Tilsley College í juni. Um loyvi verður at ferðast til Slovenia, skal Simon tala á trúboðarastevnu har í aug. Ætlanin er, at Dorit fer við.

## SVEIS, Nyon, Redeemer Grace
## Jeanette og Solomon Magura, Reuben 8, Micah 8

Nú hittast vit aftur til fundir, men við avmarkingum. Ongir fundir verða í juli, tí verða vit í Føroyum allan juli. Biðið um orku og vísdóm, nú vit royna at savna samkomuna aftur.

## *4. dagur 1. Krønb. 27.1-34, Markus 14.39-72, 1. Kor. 12.1-31*



**FØROYAR**
**Khuldah og Sámal Mikkelen**
**Josva 11, Ester 10, Samuel 6**
Biðið, at hirðatænastan ímillum ungu familjurnar verður til lívgan og hjálp.
Eg havi bíbliutímar á øllum familjulegunum í ár og verði eisini við á nøkrum summarlegum.
**– Else og Poul Johan Djurhuus**
**– Anna Maria og Rógvi Joensen**



**ÍSLAND, Akureyri**
**Kristín Gerðalíð**
Kristin er farin aftur til Íslands at hjálpa OM at fara undir nýggja tænastu í Íslandi.

**Ástjørn**
Tríggjar barnalegur og ein ungdómslega verða frá 20. juni til 12. aug. Tørvur er á hjálparfólki. Kunning: Victor Dánjalsson tel. 230211.

**Reykjavík, Akurinn**
**Rósa og Jógvan Purkhús**

**NTM - FØROYAR**
**Noomi og Eli Christiansen**
**Hadassa 10, Tabita 7, Debora 5, Natan 2**



**USA, Alabama, NTM**
**Judy og Óli á Grømma Jacobsen**

Vit eru takksom fyri høvi at bera Orðið fram í juni og juli ymsastaðni í USA. Vit røkja eisini áhaldandi ábyrgdina av leiðsluni í NTM á netinum. Um Gud vil, koma vit til Føroya um miðjan aug. til síðst í sept.



**USA, North Carolina**
**Charlotte, Calvary Church**
**Gudny og John Munro**

Vit takka fyri forbøn, nú Harrin so brádliga tók Christopher heim til sín. Ábyrgdin er stór hjá okkum, haldið tí á at biðja fyri okkum og familjuni.



**MEKSIKO, Michoacán, Puruandiro**
**Hansy og Martin Tuohy**
**Isabel 17, Victoria 15,**
**Emma Grace 13, Jónatan 11,**
**Markus 9, Evita 6, Joy 4**

Biðið fyri møguligu framtíðarleiðarunum í samkomuni, Guicho, Chuy og Gabriel og teirra familjum. Vit verða í Føroyum í juni.

**ÍRLAND, Global Serve International**
**Guðrun og Ivor Tutty**

⋆ 5. august fyllir Karis Flanagan 8 ár

## *6. dagur* *Markus 7.1-23, Ezek. 23.1-21, Ezek. 34.1-31*



### GRØNLAND, Nuuk
**Hans Sivertsen**
**Ane og Filip Sivertsen**
**Anne-Sophie og Óli Tindalíð**

Familjulega verður 27. juni - 3. juli og síðan tvær barnalegur og ein ungdómslega. Tørvur er á 10 - 15 fólkum til hvørja legu, tvs. liðleiðarum, sangarum, tónleikarum og fólki til matgerð og vask. Hesi kunnu vera støk, í bólki ella familjur við børnum. Vit hjálpa fegin við øllum spurningum viðv. flúgving og uppihaldi her í Nuuk. Kunning: Ragnhild í Skorini Jacobsen, +299 486448.



### GRØNLAND, Qasigiannguit
**Solveig og Daniel Kinda**

Í juni hjálpir Daniel at sigla privatan bát úr Danmark umvegis Føroyar og Ísland til Qasigiannguit. 3. juli hava vit dóp á vatni nakrar tímar hiðani. 11. juli til umleið 1. aug. fara vit norðureftir við bátinum Qaamaneq til bygdina Ukkusissat og møguliga Ikerasak.

## *7. dagur* *Markus 7.24-37, Ezek. 23.22-49, Ezek. 35.1-15*

### TURKALAND, Istanbul
**Annika og Stephen Everett**

Vit eru takksom fyri varðveitslu í Onglandi og samfelag við familju, vinir og samkomu hóast covid. Ætlanin er at fara aftur til Turkalands um hálvan juni at taka við aftur evangelisku tænastuni, har vit sleptu. Okkum tørvar innfararloyvi.

★ 7. juni fyllir Boas Jacobsen 14 ár

## *8. dagur 1. Krønb. 29.1-15, Orðt. 14.1-35, 1. Kor. 13.1-13*



**PAPUA NÝGUINEA, Kovol**
**Natalie og Philip Hansen**
**Louis 4, Timon 2**

Okkara starvsfelagar, familjan Stous, eru á veg aftur til Kovol í juni. Vit og kovol fólkið eru spent, til tey koma. Tey eru enn á byrjanarstøði at læra kovol málið. Biðið, at bæði tey og vit læra málið betur.



**PAPUA NÝGUINEA, Mengen**
**Annika og Simon Flanagan**
**Nya 13, Noah 12, Karis 8,**
**Judah 6, Ethan 4**

Simon skal ferðast í eina viku til gongu gjøgnum frumskógin at fáa yvirlit yvir bygdir, sum enn ikki hava hoyrt evangeliið. Biðið um treysti, góða heilsu og trygd hjá familjuni heima. Biðið, at samkoman mennist at bera mengen fólkinum gleðiboðskapin. Minnist familju í samkomuni, sum nýliga misti trý ára gomlu dóttrina.

## *9. dagur 1. Krønb. 29.16-30, 1. Kor. 1.1-31, 1. Kor. 14.1-19*



**DANMARK, Skovlunde**
**Sara og Andrew Berghamar**
**Noah 15, Lydia 4**

Vit ætlaðu at koma til Føroya at vitja í summar, men hava valt at bíða vegna óvissu. Vit fara tí at nýta summarið at fyrireika samkomuna væl til komandi skúlaár, bæði viðvíkjandil boðan, undirvísing og barna- og ungdómsarbeiði.

⋆ 9. juni fyllir Jenny í Prestgarði 14 ár
⋆ 9. juli fyllir Elliot Poulsen 5 ár

## *10. dagur* *Orðt. 10.1-32, 1. Kor. 2.1-16, 1. Kor. 14.20-40*



**ONGLAND, Cornwall**
**Anna og David Rodda**

Augustin og Moussa halda á at luta Orð Guds á radio og Facebook hvørja viku í Senegal. Í næstum verður 'the Refuge House' – Lívdarhúsið – latið upp til avmarkaða nýtslu, tí bæði gólv og tak verða liðug. Sum Harrin nú gevur fígging, verður flísalagt, málað og møblerað. Dubby heldur á at fyrireika podcast á netsíðu við heitinum 'Facing Death with Joyful Hope'. Vit leggja eisini sangir á okkara Youtube-kanal. Vit hjálpa manni við rúsevnistrupulleikum.

**ONGLAND, Birmingham, OM**
**Claire og Craig Niclasen**
**Elizabeth 15, Rebekah 13, Lydia 11**

## *11. dagur* *Markus 8.1-21, Ezek. 24.1-27, Ezek. 36.1-18*



**GRØNLAND, Qaqortoq**
**Marjun og Páll Poulsen**

Biðið, at Harrin ger útvegir, nú vit framvegis hava nakrar avbjóðingar og avmarkingar orsakað av koronu. Tað var gleðiligt at fara í býin og møta børnum aftur, sum gleða seg til legurnar í summar!



**GRØNLAND, Juvel II**
**Anna og Óli Steinberg**

**12. dagur** *Markus 8.22-9.1, Ezek. 25.1-17, Orðt. 19.1-29*



## OM, SUÐURAFRIKA
**Mamelodi Aids Hope**
**Tanja Mortensen**

Veturin er komin, og næturnar eru rættiliga kaldar. Umstøðurnar hjá teimum flestu her eru ikki góðar. Koronutølini eru vaksandi, og triðja bylgjan er væntandi. Biðið, at fólk halda tilmælini, og at ungdómslegan kann verða hildin 16.- 18. juli.

**13. dagur** *Ezek. 16.1-32, 1. Kor. 3.1-23, Ezek. 36.19-38*



## ITALIA, Sant'Elia
**Heidi og Regin Guttesen**
**Megan 16, Trisha 9, Emma 5**

Hetta summarið verður tíverri eisini merkt at koronu. Men hóast tað fara vit at halda á við so nógvum arbeiði sum møguligt. Sunnudagsmøtini, barnaarbeiðið og annað, har vit eru nógv í tali, verða hildin uttandura. Um Gud vil, hava vit eisini dóp í summar.

⋆ 13. august fyllir Isabel Tuohy 17 ár

**14. dagur** *Ezek. 16.33-63, 1. Kor. 4.1-21, Ezek. 37.1-28*



## TÝSKLAND,
**Hückeswagen, Ethnos 360**
**Wina og Benjamin Hansen**
**Noah Elias 9**

Síðst í juni hava vit kunningartiltøk í eina viku fyri tey, sum ynskja at tæna uttanlands komandi ár. Vit vænta, at yvir 20 taka lut. Vit ætla at vitja foreldrini hjá Benjamin, Peter og Rachel, í USA í juli.

## *15. dagur* *Markus 9.2-27, Orðt. 15.1-33, 1. Kor. 15.1-19*



**FØROYAR**

**Maria og Jens Bech**

Vit gleðast um, at legurnar í Zarepta eru farnar í gongd aftur. Okkum tørvar forbøn og vísdóm til tænastuna, Harrin hevur lagt okkum á hjarta.

**– Elin og Jógvan Jacobsen, Boas 14**

**– Unn og Jógvan Zachariassen**

**– Lis Zachariassen**

**– Annika og Poul Færø**

⋆ 15. juni fylla Micah og Reuben Magura 8 ár

⋆ 15. august fyllir Victoria Tuohy 14 ár

## *16. dagur* *Markus 9.28-50, Ezek. 26.1-21, 1. Kor. 15.20-38*



**FØROYAR**

**Anna og Símun Pætur á Torkilsheyggi**

Bíbliuskeiðið á Zarepta verður 30. aug. til 5. sept. Evnið verður: Gleði í Harranum, Neh. 8:10b. Til ber at tekna seg frá 15. juli hjá Giddu Vang á tlf 265390.

**Birgit og Svenning av Lofti**

Vit hava hugsað um Danmarkarferð seinni í summar. Her heima lata vit Harran leiða okkum til persónligar vitjanir, samkomuvitjanir og evangeliskt verk.

**– Rutt og John í Skemmuni**

**– Vanja og Svein í Prestgarði,**
**Jenny 14, Svend 12, Terji 9, Petra 7**

⋆ 16. juni fyllir Emma Guttesen 5 ár

## *17. dagur* *Orðt. 11.1-31, Ezek. 27.1-36, 1. Kor. 15.39-58*



### SENEGAL, Tongia
### Lív Poulsen

Tað hevur gingið væl at fáa hjálparfólk at rættlesa Lukasar evangeliið. Eg haldi á við kladduni til Matteusar evangeliið. Umsetingarráðgevin úr USA kemur í summar at kanna nøkur av brøvunum, eg havi umsett. Ungi trúgvandi maðurin heldur á at umseta 2. Mósebók og hjálpir mær eisini við ymiskum. Biðið, at Harrin gevur honum konu. Biðið eisini, at regntíðin verður góð, og at fólkið her í bygdini við ágrýtni arbeiðir á markunum, so nokk av grøði verður til heystar. Tey dýrka hirsi, mais, rís, jarðnøtir og bummull. Samverkafólk míni Erik og Wendy koma aftur til Senegal mitt í juni.

## *18. dagur* *Ezek. 17.1-24, 1. Kor. 5.1-13, 1. Kor. 16.1-24*

### MEKSIKO, Mixtec, Oaxaca
### Inga McKendry

Vit endurskoða Matteusar evangeliið, eins og vit halda á at rættlesa Ápostlasøguna endaliga. Biðið um vísdóm, so sannleikar Guds verða greitt og neyvt frambornir í umsetingini.

## *19. dagur* *Ezek. 18.1-32, 1. Kor. 6.1-20, Orðt. 20.1-30*

### PAPUA NÝGUINEA, Sorimi (fj.arb.)
### Carol og Poul Joensen

Eg ætli at fara til Sorimi í sept., um korona ikki hindrar. Nógv skal fyrireikast og samskipast til túrin. Endamálið er at vitja tey trúgvandi og rættlesa umsetingartilfar saman við umsetingarráðgeva.

**20. dagur** — **Markus 10.1-27, Ezek. 28.1-26, Ezek. 38.1-23**



**DANMARK, Kolding**
**Jan og Anne Zachariassen**

Vit eru bæði koppsett og eru sera takksom, at vit nú hava loyvi at savnast aftur til møtir. Eftir ætlan verði eg í Føroyum 21. juli - 13. aug.

**DANMARK**
**Glostrup Frikirke**

Í Glostrup Frikirke eru arbeiðsbólkar farnir at umhugsa, hvussu vit sum fríkirkja á skynsaman hátt skipa evangelisering, hirðaarbeiði og undirvísing, so fleiri finna sær andaligt heim í samkomuni.

**21. dagur** — **Markus 10.28-52, Ezek. 29.1-21, Ezek. 39.1-29**



**ONGLAND, NTM North Cotes**
**Julie og Sonni Poulsen**

Trý tey seinastu árini hevur tað fallið Sonna tungt at undirvísa; tískil eru vit farin til USA, har Sonni hevur verið til kanningar fyri minnið.

**PAPUA NÝGUNEA**
**Lili og Brian Poulsen, Elliot 5, Jude 2, Evelyn 1**

**22. dagur** — **Ezek. 19.1-14, Orðt. 16.1-33, Gal. 1.1-24**

**FILIPSOYGGJAR, Puerto Prinsessa**
**Cathy og Jógvan J. Rasmussen (fj.arb.)**

Fleiri fólk eru nú testað positiv fyri covid-19 á Balabac. Hetta hevur ikki verið ein trupulleiki har fyrr enn nú.

## *23. dagur* *Ezek. 20.1-26, 1. Kor. 7.1-19, Gal. 2.1-21*



**FILIPSOYGGJAR, Naplud**
**Monika og Tim Sharp**
**Ragnhild 17, Rebekka 16, Hanna 13**

Av koronu kann Tim ikki ferðast til aðrar bygdir og býir. Talið av fólki, sum eru testað positiv, er vaksið nógv her á oynni. Hóast børn ikki sleppa út, hava vit tað hampiliga gott í mun til nógv onnur, sum hava mist inntøku. Í ættarbólkinum ringir maðurin Karding til mín og biður um forbøn, tí hann ætlar at vitja fleiri húski at læra tey evangeliið.

★ 23. august fyllir Ethan Flanagan 4 ár

## *24. dagur* *Orðt. 12.1-28, 1. Kor. 7.20-40, Ezek. 40.1-27*

**TEILAND, Chiang Mai**
**Corine og Sørin Joensen**
**Eli 16, Aron 9, Noah Kristian 7**

Vit verða óivað aftur í summar noydd at avlýsa ferðina til Evropa. Haldið á at biða fyri tænastu okkara í Teilandi og Asia, sum framvegis er nógv ávirkað av covid-19.

★ 24. august fyllir Louis Hansen 4 ár

## *25. dagur* *Ezek. 20.27-49, Ezek. 30.1-26, Ezek. 40. 28-49*

**USA, Nebraska, Ethnos 360**
**Rachel og Peter Hansen**

Biðið fyri Hans og familjuni, sum tey fyrireika seg at flyta til Miðasia í heyst. Biðið eisini fyri Daniel og familjuni, nú tey fyrireika seg at virka í Fjareystri á vári 2022. Okkum tørvar at kenna Harrans leiðslu, nú vit byrja at ferðast aftur.

**26. dagur** *Markus 11.1-33, Ezek. 31.1-18, Orðt. 21.1-31*

## VENESUELA, Puerto Ordaz
## Nurimar og Jóhannus Frants Poulsen

Vit takka Harranum fyri, at Nýggja Testamenti nú eisini er týtt til Piaroafólkið. Tað verður nú rættlisið og so sent til prentingar. Jóhannus ætlar koma stuttan túr til Føroya í juli- aug.

**27. dagur** *Markus 12.1-27, 1. Kor. 8.1-13, Gal. 3.1-29*

## FØROYAR
## Shamila og Høgni Johannesen, Adonia 13

Vit menna og leiða STEVN átakið og STEVN skráir komandi mánaðirnar. STEVN er lærisveinaleistur í andaligari lívsvegleiðing, sum byggir á andaliga sjálvsmenning. Biðið fyri heilsu okkara eisini.

**28. dagur** *Markus 12.28-44, 1. Kor.9.1-27, Gal. 4.1-31*

## JAPAN
## Shino og Hallur Mortensen
## Kano 11, Nana 9, Louie 7, Rio 2

Í summarferiuni ætla vit at hava serligt tiltak fyri børn, ið koma til okkara at læra seg enskt. Hetta er ein møguleiki at læra tey meira um, hvør Jesus er, og at hann elskar tey.

**Útgevari:** KBS (Kristniboðssambandið)
**Blaðnevnd:** Róland í Skorini, ábyrgd, Elsa í Skorini, Randi Østerø, Dóra D. Gaard, Kristianna J. Heinesen, Óli Jákup Jacobsen, Jónvør Christiansen, Barbara og Ragnar Vest, Durita Olsen, Hanna og Sigurð Ó. Vang.
**Avgreiðsla:** Óla Hendrik av Fløtum, tel. 227057.
**Uppseting:** Palli Skorheim, tel. 290087.

**29. dagur** **Ezek. 21.1-17, Orðt. 17.1-28, Ezek. 41.1-26**



## FILIPSOYGGJAR, Manila
## Liz og Ragnar Niclasen

Vónandi sleppa vit aftur til Filipsoyggjar í heyst. Tað gongur væl at greiða tilfar, eg havi umsett, til rættlestur saman við hjálparmonnum á Filipsoyggjum. Eg gleðist um at vera við í bíbliutíma um Filippibrævið í samkomuni her í Kanada.

★ 29. juli fyllir Timon Hansen 2 ár

**30. dagur** **Ezek. 21.18-32, Ezek. 32.1-32, Ezek. 42.1-20**



## SENEGAL, Dakar
## Marion og Hans Arni Jensen
## Ryan 12

Marion hevði góðan túr í USA í mai, tá pápin helt 80 ára føðingardag. Vit eru fáment á skrivstovuni í summar. Í juli er ætlanin at fara til Guinea í ein mánað at læra úr Orði Guds. Í Dakar búgva nógv fólk úr Guinea, so vit hava høvi at venja susu málið næstan hvønn dag. Í aug. byrjar Ryan aftur í skúla. Biðið fyri teimum nýggju, ið virka saman við okkum, at tey trívast og læra franskt.

**Myndasavn:** pallis76@yahoo.dk
**Prent:** Føroyaprent, tel. 314555.
**Teldupostur:** prayerservicefo@gmail.com
**Heimasíða:** www.kbs.fo

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
SVANAMERKTUR PRENTLUTUR 541 705

©KBS. *Loyvt er at endurgeva tilfarið, um keldan verður nevnd.*

## BÓKATÆNASTAN

Biðið fyri bókatænastuni hjá Leirkerinum, Logos Hope og Bókasøluni Logos!

## NÝGGJ BÓK!

**300 síður 280 kr.**




Danin, cand. jur. Poul Madsen, 1916-2009, hevur skrivað bók um Ezekiel profet í Gamla Testamenti. Hetta eru bíbliutímar, sum hann helt í seinnu helvt av 1950-árunum í Keypmannahavn. Tað er tí umráðandi hjá tí, sum í dag lesur bókina á føroyskum, at geva sær far um – í fyrsta lagi, at hon er bíbliutímar til danir fyri umleið 65 árum síðan, og í øðrum lagi at hugsa um tað, sum Poul einaferð skrivaði um eina aðra bók hjá sær: „Eg havi valt at varðveita tað talaða málið og biði tí lesaran seta seg í stað áhoyrarans og hugsa um, at orðini upprunaliga eru talað og ikki skrivað.“ Páll á Lakjuni týddi. Fæst til keyps á www.leirkerid.fo og í bókahandlunum kring landið.

Jákup Nolsøesgøta 17, Tórshavn
Opið mán.-frí. kl. 14:00-17:30.
Tel. 312372 / 282372 www.logos.fo

BÓKASØLAN logos